## Hvalir fáa sendara

Seinastu tíðina hava grønlendskir veiðimenn og lívfrøðingar sett gørn eftir hvíthvali og náhvali, sum síðani hava fingið hvør sín sendara, áðrenn teir eru sleptir avstaðaftur. Endamálið við merkingini er at fáa eina ábending um, hvussu nógv er til av hesum hvalasløgunum fram við grønlendsku strondini. Harumframt er ætlanin at kanna, hvar hvíthvalur og náhvalur halda til um veturin, og hvussu veðurlagsbroytingarnar fara at ávirka hvalin.



# Føroyar á heims-hitlista yvir verkføll

**Stóra bretska blaðið hevur gjørt ein lista yvir nøkur av verðins stórstu verkføll. Five Heavyweight Strikes nevnist greinin, og har eru Føroyar komnar í part saman við Suðurafrika, Guinea, Columbia og Zimbabwe**

VERKFØLL
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*






*Lisa Kudrow frá kendu røðini Friends luttók í verkfalli í Hollywood í seinastu viku. Hetta hevur fingið bretska blaðið, Sunday Times, at gera ein hitlista yvir heimsins stórstu verkføll. Og Føroyar hava fingið heiðurspláss*

Føroysk børn kundu ikki fara í skúla, tí skúlarnir vóru so skitnir, at vandi var fyri smittu. Eingir almennir bygningar vórðu vaskaðir, einki bensin var til keyps, og á leið ein triðingur av arbeiðandi føroyungum vóru í verkfalli í fýra vikur.

Henda støðumyndin av Føroyum í 2003 er orsøkin til, at Føroyar eru komnar á ein almennan hitlista í stórsta sunnudagsblaðnum í Bretlandi, The Sunday Times. Her eru vit komin í fínt selskap saman við Suðurafrika, Guinea, Columbia og Zimbabwe

Í seinastu viku vóru leikrithøvundar í Hollywood í verkfalli, og hetta fekk nógv spaltupláss í miðlum kring allan heim. Fronsku verkføllini enda eisini sum forsíðustoff um allan heim, men – staðfestir Sunday Times – tað eru eisini onnur minst líka stór og umfatandi verkføll aðrastaðni í heiminum. Blaðið hevur tí gjørt ein hitlista, og har hitta Føroyar.

### Stórstu og blóðigastu verkføllini

Um hitlistan verður sagt, at hetta eru tey stórstu og blóðigastu verkføllini í verðini. Í Zimbabwe vóru kommunulæknar í verkfalli seinasta ár, har teir kravdu eina lønarhækkan á 8000 prosent. Hetta ljóðar himmalhøgt, men inflatiónin í landinum var yvir 1000 prosent. Tá ein hálv millión kolumbianarar fóru í verkfall í 1998, setti nýggi forsetin í landinum herðin inn, og tað endaði við blóðbaði.

Í Guinea mótmæltu fólk um inflatión, vatnmangul og arbeiðsloysi við at fara í verkfall í januar í ár. Hetta endaði í gøtubardaga og 59 deyðsføllum. Og í summar var stórsta verkfallið í Suðurafrika, síðani apartheid varð avtikið.

Føroysku verkføllini kunnu tykast lítil og friðarlig í mun til hini á listanum, men av tí at landið er so lítið, fáa tey stórar avleiðingar og kunnu leggja alt landið lamið. Tí hava vit fingið heiðurspláss á listanum.

### Heimsmeistarar í serklassa

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sigur, at henda greinin als ikki undrar seg. Í verkfallinum í 2003 var ein kanning gjørd, har føroysk verkføll vóru samanborin við tey donsku, og har niðurstøðan var, at Føroyar er verkfallsmeistarar.

- Tað er eingin ivi um at hyggja vit at Europa, so hava vit álvarsamar trupulleikar. Og hóast verkføllini vóru fleiri fyri nøkrum árum síðani, so er hugburðurin ikki broyttur, heldur Jan Mortensen og vísir til verkfallið í føroyska bankasektorinum í ár.

- Einki bankaverkfall hevur nakrantíð verið í Danmark, og sum vítt sum eg veit, so er hetta heldur ongantíð hent í Europa nakrantíð.

Stjórin í Vinnuhúsinum vísir til, at amboðini til samráðingar á arbeiðsmarknaðinum ikki eru broytt. Semingslógin er frá 1928 og er ongantíð broytt. Í grannalondum okkara fingu tey sterk amboð fyri hundrað árum síðani, tí tey høvdu stórar trupulleikar við verkføllum, men hetta hava vit ongantíð fingið.

Spurdur um føroyska plaseringin millum triðaheimslond ikki kann siga nakað um vánaligu umstøðurnar hjá føroyskum arbeiðsfólki, sigur Jan Mortensen, at tað heldur hann avgjørt ikki.

- Tá eg hyggi út gjøgnum vindeyga, havi eg ringt við at síggja tað samanberinga, sigur hann.

Sosialurin hevur roynt at fingið viðmerking frá Samtak, men samskiparin, Sonja Jógvansdóttir, var ikki at hitta.

## Í øllum førum europameistarar

**Tá stóra verkfallið í 2003 var sjey dagar gamalt, gjørdi Gunnar Skúvadal í ÚF eina samanbering av støðuni í Føroyum samanborið við onnur lond. Kanningin staðfesti, at Føroyar vóru europameistarar**

VERKFØLL
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Kanningin var gjørd í samband við at Politiken skýrdi Danmark fyri at vera evropameistarar í verkfalli. Niðurstøðan var, at Føroyar lógu frammanfyri Danmark.

Politiken skrivaði 30. apríl hetta árið, at danir vóru evropameistarar í at vera í verkfalli. Tí heilir 462 arbeiðsdagar fyri hvørjar 1000 íbúgvar fóru fyri skeyti tíðarskeiðið frá 1998 til 2002. Og hetta gav dønum tann ivasama heiðurin, at teir høvdu lagt niður arbeiðið í fleiri dagar enn nakað annað land í ES - og tað heldur eisini um vit rokna Noreg, Pólland, Ungarn og Kekkoslovakia uppí.

Evropeiski Arbeiðsmarknaðarstovnurin EIRO hevði gjørt samanberingina fyri hesi fýra árini. Samanbergingin vísir, at danir eru nógv fremst - á øðrum plássi er Spania, har fóru 173 arbeiðsdagar fyri skeyti fyri hvørjar 1000 íbúgvar hetta sama tíðarskreiðið.

ÚF kannar somu tøl fyri Føroya, og tá tølini verða faldað, løgd saman og síðani deild út á 1000 íbúgvar sæst, at vit í Føroyum hava mist gott og væl 6.000 arbeiðsdagar fyri hvørjar 1000 íbúgvar í eitt fýra ára skeið. Og tað er væl meira, fyri ikki at siga fleiri ferðir meira, enn toppskorarin, Danmark.